# Mistak endaði sum neyðhjálp

**Tað var eitt mistak av Oyggjatíðindum at leggja Jógvan við Keldu undir at svara eini kontaktlýsing. Talan var um annan kommunalpolitikara í Klaksvík, sigur blaðið í fríggjadagsútgávuni**

MISTAK

Hóttanin frá Jógvani við Keldu, landsstýrismanni, um stevning fekk blaðstjóran á Oyggjatíðindi at góðtaka treytirnar, sakførarin hjá landsstýrismanninum legði á fyri at sleppa undan rættarmáli.

Blaðið avsannar í fríggjadagsútgávuni, at talan var um Jógvan við Keldu, táverandi borgarstjóra í Klaksvík, sum svaraði eini kontaktlýsing frá eini kvinnu. Umframt játtar blaðstjórin at ganga undir ta treyt, sum sett er, at hann skal rinda kr. 10.000,- til neyðhjálpartiltakið hjá Reyða Krossi.

Men blaðstjórin vil ikki viðganga, at søga varð tikin úr leysari luft. Hann hevur nevnt skeivan mann, sigur hann, og navngevur í staðin annan fyrrverandi býráðspolitikara í Klaksvík.

**ej**

# Einki mvg verður tikið

**Toll– og skattstova Føroya hevur onga heimild at krevja mvg ella skatt av pengunum, sum verða latnir neyðhjálparfelagsskapum sum Reyða Krossi**

NEYÐHJÁLP

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Stýrið í Toll– og Skattstovu Føroya avsannar, at mvg verður tikið av peninginum, sum verður latin hjálparfelagsskapum.

– Av tí, at eingin vøra og eingin tænasta verður latin, men bert peningagávur, so hava vit ikki heimild at taka mvg ella skatt av upphæddini, sum Reyði Krossur í hesum døgum fær inn, verður sagt.




**Mvg av bússunum**

Av tí, at øll hava verið so fús at rætta eina hjálpandi hond, hevur ikki verið neyðugt hjá Reyða Krossi at keypt nakað í sambandi við innsavningina. Bússurnar eru gjørdar og latnar av Kemilux, og øll arbeiðskraftin er sjálboðin – og harvið eisini ókeypis.

Men í Danmark hevur Reyði Krossur verið noyddur at keypa m.a. innsavningarbússurnar, og tá hava teir so eisini verið noyddir at goldið mvg.

– So skjótt ein hjálparfelagsskapur fer út og keypir vørur ella tænastur fyri innsavnaðan pening, eru teir noyddir at gjalda mvg, sum øll onnur. Og tað er tað, sum er hent í Danmark. Fer Reyði Krossur í Føroyum at keypa sproytur, rís ella onkra aðra neyðsynjarvøru fyri peningin, sum kemur inn, so verður eisini tikið mvg av tí keypinum. Men lata teir peningaupphæddina beinleiðis til neyðstadda landið, so verður ikki eitt oyra tikið av, staðfestir Toll og Skatt.

**Endurgoldið mvg**

Velur Reyði Krossur Føroya hóast alt at senda vørur til Asia ístaðin fyri pening, so er tó ein møguleiki at fáa mvg'ið aftur.

– Keypa teir vørur her heima, sum teir síðani senda avstað, eru teir eftir lógini noyddir at rinda mvg'ið av keypinum. Men tað er ein kunngerð, ið sigur, at felagsskapir, ið fáast við vælgerandi endamál, kunnu søkja um at fáa mvg'ið endurgoldið. Men t´eru tað sjálvandi nakrar treytir, sum skulu verða uppfyltar áðrenn, siga tey á Toll og Skatt at enda.

Føroyingum nýtist tí ikki at óttast, at peningurin , teir lata í neyðhjálp, endar aftur í landaskassanum ella statskassanum. Ikki ein króna verður tikin av innsavnaðu upphæddini, tí tað er heilt einfalt ikki loyvt.

# – Vit hava álit á Reyða Krossi

**Aðalskrivarin í Heimamissiónini, Vagn Foldbo sigur, at nógv av teirra fólki longu eru við í ymiskum innsavningum**

Hóast nógvir felagsskapir savna inn til offrini fyri flóðalduna, so fer Heimamissiónin í Føroyum ikki sum so at skipa fyri nakrari innsavning.

Aðalskrivarin, Vagn Foldbo sigur við blaðið Trúboðan at hann veit um nøkur av missiónshúsunum sum longu hava havt innsavning til frama fyri neyðhjálpararbeiðinum. Haraftrat eru nógv missiónsfólk við í øðrum innsavningartiltøkum.

Tí fer Heimamissiónin ikki at skipa fyri nakrari síðuleypandi innsavning, men vit heita heldur á fólk um at stuðla innsavningini hjá Reyða Krossi.

– Tað kann vera óheppið um tað eru ov nógvir pottar. Vit hava álit á Reðya Krossi, og tí halda vit at tað er rætt at stuðla har. Tað er eisini umráðandi, at hjálpin kemur skjótt fram, sigur Vagn Foldbo.

Sunnudagin 16. januar verður haraftrat savnað inn í kirkjunum fyri at stuðla neyðhjálpararabeiðinum.

**sb.**

# Fáa minni fyri hvørja lønarkrónu

Fíggjardeildin hjá Sparikassanum hevur við áhuga hugt at teimum nýggjastu hagtølunum frá Hagstovuni, sum vísa, at inflasjónin í Føroyum er farin úr 0,5 prosentum upp í 1,8 prosent eftir einum ári.

– Inflasjónsgongdin er vend frá lítlum og ongum prísvøkstri, til ein størri prísvøkstur. Hetta merkir í stuttum, at fólk fáa minni fyri lønarkrónurnar, sigur Johnny í Grótinum, búskaparfrøðingur og ráðgevi á fíggjardeild Sparikassans. Hann vísir á, at høgu oljuprísirnir, ið eru høvuðsatvoldin til vaksandi inflasjónina í 2004, ikki longur eru so øðiliga høgir. Tá oljuprísurin var upp á sítt mesta í heyst, kostaði ein tunna av ráolju umleið 55 dollarar, men síðani er oljuprísurin lækkaður umleið 20 prosent, umframt at dollarin somuleiðis er lækkaður stívliga 10 prosent.

– Tað kann bera í sær, at inflasjónin, sum frá líðir, eisini fer at venda pílinum niðureftir, sigur Johnny í Grótinum.

# Krýddarí sum smápartafelag

Tveir av okkara skemtarum hava nú stovnað eitt smápartafelag.

Væl umtóktu skemtararnir, Jákup Veyhe og Sjúrður Skaale, hava nú skipað stuttliga virksemi sítt í eitt smápartafelag.

Skráseting Føroya boðar frá, at hon tann 22. desember í fjør skrásetti Sp/f Pipar & Salt. Stovnararnir eru teir báðir skemtararnir, Jákup Veyhe og Sjúrður Skaale, og teir manna eisini stjórnina í nýggja felagnum.

Í endamálsorðingini hjá felagnum stendur, at tað skal fáast við virksemi innan gaman og álvara, undirhald, útgávuvirksemi umframt annað starv í hesum sambandi.

Lógin krevur, at smápartafeløg hava 80.000,00 kr. í partapeningi, og hann hava stovnararnir av Sp/f Pipar & Salt goldið kontant til kurs 100.